# Spælimenn í Lágargarði

HUGNALØTA
*Jan Müller*

Týskvøldið var hugnakvøld fyri teimum gomlu á heiminum í Lágargarði í Havn. Og sum vant var livandi tónleikur á skránni. Hesaferðina fingu Spælimennininir høvi at spæla fyri teimum búfólki og avvarðandi. Og teir settu eisini sín serstaka dám á hugnakvøldið við sínum livandi spælimanstónleiki. Tað er so heppið, at Spælimenninir eru savnaðar í hesum døgum fyri at spæla inn sína sættu fløgu. Tey, sum eru við í Spælimonnunum, eru Krisjan Blak, Sharon Weiss, Jan Danielson, Erling Olsen, Ívar Bærentsen og Charlie Pilzer. Spælimenninir hava mong ár á baki. Tað byrjaðI við Spælimonnunum í Hoydølum í 1974. Men hetta orkestrið hevur umleið 23 ár á baki. Tey skulu á konsertferð í Fraklandi í august og til USA í oktober.

Spælimenninir spæla í Lágargarði. Myndir Jan Müller
















# Hvørt arbeiðspláss á sjónum, gevur 4-5 á landi

**Sum árini eru liðin, er fiski-og útróðrarvinnan í norðurlondum vorðin nógv effektivari. Ein einsamallur maður megnar í dag at fiska eins nógv og ein heil bátsmanning megnaði fyri bert hálvthundrað árum síðan**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Sambært Norðurlendska Ráðharraráðnum eru 40.000 fiski-og útróðrarmenn í norðurlondum, og talið av fiskiførum er 26.000*

Í einum lítlum bóklingi, sum Norðurlendska Ráðharraráðið hevur givið út um fiskivinnuna í norðurlondum, verður sagt, at fiskiveiða og fiskivinna áttu lívið í okkara forfedrum, sum fyri meira enn tíggju túsund árum síðan settu seg niður við norðurlendsku strendurnar. Sum frá leið, gjørdist fiskurin støðið undir teirri nógv størstu útflutningsvinnuni í norðurlondum.

- Toskur var størsta útflutningsvøran, og turkaður helt hann sær leingi. Tá ið tað gjørdist lættari at fáa fatur á salti, varð toskurin virkaður til saltfisk og klippfisk. Saltað sild var ein týdningarmikil útflutningsvøra, eins og lýsið í fleiri hundrað ár eisini hevur verið ein av týdningarmestu útflutningsvørunum. Lampurnar brendu lýsi, og lýsið varð eisini brúkt á skinnvirkjum og sum smyrjolja hjá gomlu handverksvinnuni. Uttan inntøkurnar frá fiskaútflutninginum, høvdu norðurlondini ikki kunnað útvegað sær korn og aðrar dýrar vørur, sum vórðu innfluttar úr evropeisku grannalondunum, verður sagt.

### Nærum ótømandi…

Tá ið fiski-og útróðrarmenninir í norðurlondum vóru flestir, vóru teir fleiri hundrað túsund í tali, og við fiskiførunum og veiðitøknini, sum tá var, vóru fiskastovnarnir nærum ótømandi.

- Øll, sum høvu hug, kundu taka lut, tá ið sildin, toskurin og onnur fiskasløg stóðu tætt í vertíðini. Sjógvurin var hagin, har pláss var fyri øllum, ið ikki vunnu til lívsins uppihald við at velta jørðina.

Í bóklinginum verður sagt, at í dag er fiskivinnan munandi effektivari. Einsamallur maður megnar at fiska eins nógv og ein heil bátsmanning megnaði fyri bert hálvthundrað árum síðan.

- Framvegis gevur fiskivinnan arbeiði til nógv fleiri, enn flestu okkara geva sær far um. Hetta er galdandi bæði fyri tey, ið fiska og virka fiskin og øll tey, sum veita fiskivinnuni vørur og tænastur.

### 4-5 arbeiðspláss

Í einum yvirliti í bóklinginum sæst, at talið av fiski- og útróðrarmonnum í norðurlondum er 40.000, og av hesum hava einir 25.000 fiskiveiði sum høvuðsyrki. Talið av fiskiførum er 26.000.

Víst verður eisini á, at samlaða fiskiveiðan í norðurlondum (1996-1999) er 6-7,6 miljónir tons, og talið av arbeiðsplássum, sum beinleiðis og óbeinleiðis er knýtt at fiskivinnuni, er í minsta lagi 200.000 ársverk.

Serfrøðingar halda, at hvørt arbeiðspláss á sjónum, gevur grundarlag fyri í minsta lagi 4-5 arbeiðsplássum á landi.

# Strandingar ætla at byggja røktar-og ellisheim

**Úr Eyrugøtu, har heimið ætlandi skal byggjast, er útsýni yvir Raktanga og Nólsoynna. Økið er sera stórt, og góðir møguleikar verða at útbyggja røktar-og ellisheimið eftir tørvi**

ELDRARØKT
*Vilmund Jacobsen*



*Sjóvar kommuna hevur samtykt at broyta fíggjarætlanina fyri 2003, soleiðis at skjøtil kann setast á byggingina av einum ellis-og røktarheimi í kommununi.*

**Strendur:**
Sjóvar kommuna hevur í hyggju at byggja røktar-og ellisheim í Eyrugøtu á Strondum. Tekningar eru gjørdar, og sambært teimum er ætlanin at byggja seks lonir, sum verða bundnar saman við millumgongdum. Hvør lonin skal hava pláss fyri 9 búfólkum við einum tilhaldsrúmi, sum liggur miðskeiðis í húsinum. Hvørt búfólk fær sína egnu íbúð, ið verður umleið 37 fermetrar stór.

Tað er felagið, E.M. Ráðgeving, sum hevur gjørt tekningarnar.

Sosialurin hevur skilt, at heim av slíkum slagi eru bygd í Danmark við sera góðum royndum.

### Heimligt umhvørvi

Formaðurin í Sjóvar kommunu, Eivind Jacobsen, sigur, at hugskotið við hesi bygging er at geva brúkarunum eitt so heimligt umhvørvi sum gjørligt og at kunna seta íbúgvarnar saman eftir tørvi. Málið er at skipa so fyri, at sjálvhjálpin búgva saman og at tey, sum eru meira ellisfarin og óhjálpin, búgva saman.

- Aftrat hesum verður møguleiki at brúka eini hús til eldrasambýli, sigur bygdaráðsformaðurin.

Úr Eyrugøtu, har heimið ætlandi skal byggjast, er útsýni yvir Raktanga og Nólsoynna. Økið er sera stórt, og góðir møguleikar verða at útbyggja røktar-og ellisheimið eftir tørvi.

Eivind Jacobsen veit eisini at siga, at á kommustýrisfundi fyrr í vikuni fekk Sjóvar kommuna 397 undirskriftir frá fólki sum ynskja, at ellisheim verður bygt.

Í morgun klokkan 9.15 verður tíðindafundur á kommunuskrivstovuni á Strondum um ætlaðu bygg-ingina.

### Broyta fíggjarætlanina

Sosialurin hevur skilt, at Sjóvar kommuna hevur samtykt at broyta fíggjarætlanina fyri 2003, soleiðis at skjøtil kann setast á byggingina.

Sum er, eigur kommunan ikki lendið, har røktar-og ellisheimið skal byggjast.

Í sínari tíð áttu Skála kommuna og Sjóvar kommuna í felag læknahølini í Skála kommunu, sum nú eru eldrasambýli, men Sjóvar kommuna er ikki við í hesi ætlan og eigur tískil einki í bygninginum longur.